Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 6. august 2004



**Musikkprogrammið: Kaizers Orkester**

Musikkprogrammið hjá Dr2 sendir í kvøld eina dokumentarsending um tann sera væl umtókta norska bólkin Kaizers Orkester. Bólkurin spælir eina serliga blanding av týskum umpa-tónleiki og rokktónleiki - teir syngja bara á tí norska móðirmálinum. Fylgt verður við bólkinum á konsertferð í Týsklandi har teir eru sera populerir.

**Fríggjadag 6. kl. 21.50**



**Simpsons**

Homer møtir eini rúgvu av Hollywoodstjørnum, sum halda feriu á einum loyniligum goymdum staði í býnum. Homer lovar, at hann ikki skal siga nøkrum, at tey eru í Springfield... Kim Basinger og Alec Baldwin eru millum gestarøddirnar.

**Hósdag 12. kl. 18.00**

**Sommersby**

Jack Sommersby vendir, eftir 6 ár í krígsfangalegu, aftur til fátæksliga heimbýin Vine Hill. Kona hansara Laurel kennir nóg illa mannin aftur, hann er als ikki tann sami. Sommersby, sum fyrr drakk og spældi kort, verður nógv umhildin í býnum og Laurel heldur væl til standa. Men fortíðin er ikki so at renna undan.

**Fríggjadag 6. kl. 20.20**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**